# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*– Eg eri 34 ára gamal, men eg havi tað sum ein 10 ára gamal drongur.*

*Lilian Thuram, franskur landsliðsspælari, sum nú skal spæla sína næstu HM-finalu í fótbólti*

# Zidane sendi Figo út

**Zinedine Zidane skoraði einasta málið hálvfinaluni millum Frakland og Portugal, og nú er greitt, at Føroyar í næstu EM-undankapping skulu spæla í móti bæði heimsmeistaranum og varaheimsmeistaranum**

HM
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Tveir av stóru profilunum í HM-kappingini. Zidane takkar Figo fyri dystin, har Zidane stóð eftir sum sigursharrin*

*Mynd: Scanpix*

Frakland og Italia skulu spæla í HM-finaluni í fótbólti í ár.

Tað er greitt eftir hálvfinalurnar í gjárkvøldið og týskvøldið.

Harvið er samstundis greitt, at Føroyar skulu spæla ímóti heimsmeistaranum í fótbólti í næstu EM-undankapping, sum byrjar eftir summarferiuna. Føroyar eru nevniliga komnar í bólk saman við bæði Italia og Frakland, og so føroyska liðið sleppur av álvara at royna seg í undankappingini.

Seinna hálvfinalan í HM varð spæld í gjárkvøldið, og hon endaði við, at Frakland vann 1-0. Einasta málið í dystinum skoraði Zinedine Zidane við brotssparki í fyrra hálvleiki. Harvið setti Zidane eina tjúkka striku undir sítt frálíka avrik í hesari HM-kappingini, og hann kann rættiliga siga farvæl við fótbóltsheimin, um hann sum liðformaður á franska liðnum gerst heimsmeistari sunnudagin.

## Uppiborin sigur

Dysturin millum Frakland og Portugal var tættur. Tað vóru ikki stóru kjansirnir, og hóast Frakland í longum løtum var betra liðið, so kundi Portugal eisini havt fingið okkurt mál.

Frakland fekk sítt mál við brotssparki, og fleiri ferðir royndu portugisisku spælararnir at fáa brotsspark, men tað vildi dómarin ikki geva teimum. Hetta skapti stóra øsing á beinkinum hjá Portugal, har venjarin Scolari stóð og veipaði og rópti fleiri ferðir eftir dómaranum.

Eftir dystin viðurkendi hann tó, at Frakland hevði uppiborið at koma víðari.

– Tað var ein uppiborin franskur sigur. Hetta var ein sera trupul dystur, men vit royndu okkara besta, og vit mugu viðurkenna tapið. Vit høvdu nakrar fáar málkjansir í dystinum, men vit misnýttu teir, og tí taptu vit, segði Scolari eftir dystin.

Sáttmálin hjá Scolari við portugisiska fótbóltslandsliðið gongur nú út, og tað er óvist, hvat Scolari nú skal gera. Hann hevur fingið góð úrslit við Portugal, tí fyri tveimum árum síðani kom hann í EM-finaluna, og hesaferð komu teir heilt til hálvfinaluna í HM.

## Bara komin hálvan veg

Franski landsliðsvenjarin legði eftir sigurin á Portugal áherðslu á, at enn var uppgávan hjá teimum undir HM langt frá liðug. Hann helt fyri, at enn var arbeiðið bert hálvliðugt.

– Tað einasta, sum telir nú, er at vit vinna finaluna og koma heilt upp á toppin. Vit kunnu ikki lata okkum noyða við at koma í finaluna. Vit skulu eisini vinna hana, og vit fara at fyrireika okkum væl til dystin sunnudagin, segði Raymond Domenech.

Ein av spælarunum, sum var við til at vinna HM í 1998, er Lilian Thuram, og hann tóktist mest sum ovfarin, tá tað var greitt, at hann skuldi spæla í eini HM-finalu afturat.

– Eg eri 34 ára gamal, men eg havi tað sum ein 10 ára gamal drongur, sum hevur sæð sítt fyrsta HM-endaspæl. Vit hava allatíðina stíla eftir at koma í finaluna, og tí hevði tað verið ræðuligt, um vit høvdu tapt í kvøld, segði Thuram.

Hann er ein av teimum royndu spælarunum á franska liðnum, og tað eru nógvir av teimum, tí Frakland hevur mannað elsta liðið undir kappingini. Til hálvfinaluna ímóti Portugal í gjárkvøldið var miðalaldurin á liðnum, sum byrjaði dystin, 30 ár og 10 dagar.

## Valdu at spæla sítt egna spæl

Thierry Henry er ein annar av fronsku spælarunum, sum var við til at vinna HM í 1998, og hann hevði eina frágreiðing um, hví tað gekk so væl hjá teimum nú.

– Tað, sum er hent við liðnum, er, at vit eru givnir at lurta eftir atfinningum ímóti okkum, og ístaðin spæla vit okkara spæl – tað hevur størstan týdning, sigur Henry.

– Vit stríddust sum leyvur, og fólk mugu hava sæð, hvussu stóran vilja, vit hava. Haraftur at spæla vit eisini á høgum teknsiskum støði.

Thierry Henry og hini fronsku spælararnir skulu nú fyrireika seg til HM-finaluna, sum verður spæld í Berlin sunnukvøldið kl. 20.00.

## HM manglar mál

HM
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

HM-endaspælið í Týsklandi er málfátækt, og bert einaferð í søguni er tað komið fyri, at færri mál eru skotin í einum HM-endaspæli, enn tað eru skotin í ár.

Í miðal eru skotin 2,27 mál í hvørjum dysti undir HM-endaspælinum í Týsklandi, og tað er eitt tað lægsta talið nakrantíð.

Bert einaferð í søguni er tað komið fyri, at færri mál eru skotin í eini HM-kapping, og tað var í Italia í 1990. Tá vóru 2,21 mál skotin fyri hvønn dyst.

Áðrenn finaluna og dystin um triðja pláss eru 141 mál skotin í teimum 62 dystunum. Tað gevur eitt miðaltal á 2,27. Nú eru tveir dystir eftir at spæla, um tað ikki verða skorað mál í vanligu leiktíðini av hesum dystunum, endar hetta HM-endaspælið sum tað málfátækasta nakrantíð.

Tað er kanska heldur ikki so løgið, at fá mál verða skotin í HM-kappingini, tí tey londini, sum eru komin langt í kappingini, hava havt eina krútsterka verju. Víst hava Frakland, Italia og Portugal skorað nøkur mál, men londini hava vart sera væl.

Dysturin um triðja plássið verður leygardagin, og HM-finalan verður sunnudagin.

## Skotar stuðla Ronaldo

Cristiano Ronaldo er alt annað enn populerur í Onglandi í løtuni. Hansara leiklutur í tapinum hjá Onglandi og útvísingini av Wayne Rooney hava havt við sær, at onglendingar halda lítið um portugisiska spælaran. Men skotar eru hinvegin fegnir um Ronaldo, og nú heitir heimasíðan The Tartan Army á allar skotar um at atkvøða fyri Ronaldo sum besta unga spælara undir HM. Hetta siga teir verður gjørt fyri at arga teir ensku áskoðararnar. Undir hálvfinaluni ímóti Fraklandi í gjárkvøldið, ýldu áskoðararnir eftir Ronaldo hvørjaferð hann hevði bóltin, men Ronaldo sigur, at tað lat hann seg ikki nerva av.